Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum

Evni: Orkuskifti

Spurningar:

1. Hvørji ítøkilig átøk, ið tryggja, at húski við lágum inntøkum kunnu vera við í orkuskiftinum, hevur samgongan tilreiðar at seta í verk?
2. Nær kunnu hesi húski vænta, at lovaða trygdin og lovaðu átøkini verða framd í verki?

Viðmerkingar:

Í «samgonguskjali samgongunnar» undir orka og umhvørvi lesa vit, at samgonguflokkarnir: “vilja tryggja, at húski við lágum inntøkum kunnu vera við í orkuskiftinum.”

Her er talan um glæsiligar ætlanir og lyfti, ið mong munnu fegnast um og síggja fram til, serliga í teimum krevjandi tíðum við methøgum orkuprísunum, vit eru komin í.

Fyri at kveikja undir vónina og vekja enn størri áhuga fyri orkuskiftum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 2. juni 2026

Jenis av Rana